# Magni spældi og sang

Ein hugnalig løta á landsfundi Miðfloksins var, tá Magni Christiansen spældi og sang. Hann var heldur ikki pírin at lata frá sær og spældi fleiri sangir, áðrenn konan, Elsi Christiansen, helt áhugaverdan fyrilestur um elsta son teirra, sum hevur lærutrupulleikar. Sum lesast kann í greinini her niðan fyri, eru eingi tilboð, sum eru nøktandi fyri hendan dreingin, og endin var, at tey fluttu niður til Danmarkar. Magni Christiansen spældi og sang »Mín Jesus livir«, síðan »Mítt ynski er at síggja Jesus fy rst«, og at enda »Meir eg síggi, meir eg undrist«, og eftir fyrilesturin »Her glaður eg ferðist«.



*Magni Christiansen sang áðrenn og eftir fyrilesturin hjá konuni*
*Mynd: Leo Poulsen*



*Elsi Christiansen greiddi frá um teirra trupulleikar við at fáa nøktandi lærutilboð til elsta sonin*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Ov fá lærutilboð í Føroyum

**Tá hjúnini Elsi og Magni Christiansen gjørdust varð við, at elsti sonurin ikki mentist sum hann átti, sóu tey seg noydd at flyta til Danmarkar, tí tað vísti seg ikki at vera nøktandi lærutilboð til dreingin í Føroyum**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á landsfundinum hjá Miðflokkinum, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum leygardagin, var ein gestarøðari, Elsi Christiansen. Men fyrst legði maður hennara, Magni Christiansen fyri við at syngja nakrar sangir.

Hann sang fyrst sangin »Mín Jesus livir«, síðan »Mítt ynski er at síggja Jesus fyrst«, og at enda »Meir eg síggi, meir eg undrist«.

Síðan fekk Elsi orðið. Hon greiddi frá tíðini tá Hákun, ið er elsti sonur Elsi og Magna, bleiv føddur. Elsi hevði havt fosturvatnsforgiftning, og varð sett í gongd at eiga ein mánaða ov tíðliga.

Frá barnsbeini av, var Hákun eitt sindur seinur, og helt hetta áfram í skúlanum. Sum Hákun eldist, gjørdist trupulleikin alt størri, og tørvurin á stuðli og serundirvísing øktist alsamt. Ein lærari metti at tørvur var á leið 20 stuðulstímum um vikuna. Men øll árini lá stuðulin millum 0 – 4 tímar um vikuna.

Royndir vístu, at sonurin var um fýra ár aftan fyri í menningini, í mun til javnaldrandi.

Tankin um at koyra sonin í skúlan á Trøðni, var eisini til staðar, men tað vóru eisini trupulleikar hesum viðvíkjandi – millum annað við flutningi millum Kvívík og skúlan í Havn, segði Elsi Christiansen.

## Góður skúli

Síðan byrtist tankin um at flyta til Danmarkar. Húsini blivu seld nærum beinanveg, eisini áðrenn ætlanirnar um at flyta vóru búnaðar. Og ongar aðrar fyrireikingar vóru gjørdar.

Í øllum hesum umstøðum, valdu vit at leggja alt í Harrans hond, segði Elsi Christiansen.

Og sum tað vísti seg, so lagaði alt seg til rættis á rættan hátt og í tøkum tíma. Og familjan flutti niður til Lemvig.

Frá Lemvig kommune fekk familjan tilboð um júst ta hjálp, tørvur var á. Og á allan hátt hevur familjan kent seg væl, og fingið stuðul.

Tey góvu eitt óbindandi tilboð uppá eini hús, og áðrenn tey vistu av, hevði seljarin tikið av. Tey dámdu so væl húsini, at tey tóku avgerð um at keypa tey.

Skúlin hevur verið sera góður fyri Hákun, og hann fær góða hjálp, umframt økjandi arbeiðsuppgávur og skúlating í takt við menningina, og fáa tey í skúlanum nógvar ymiskar øðrvísi avbjóðingar. Eisini tey sum kanska ikki eru sterk bókliga, sleppa at menna seg við ymiskum handaligum, sum tey eru góð til, segði Elsi Christiansen.

Drongurin er mentur sera nógv, síðan tey fluttu niður, og tey síggja allatíðina framgongd við dronginum.

## Ógreið svar

Tey eru eisini komin inn í andaliga arbeiðið har í nærøkinum. Tey skipa fyri sunnudagsskúla og líknandi barnatiltøkum.

Elsi nam eisini við tvørleikarnar, tá tað ræður um at taka bil við niður til Danmarkar. Hon vísti á, at hon hevði spurt fýra ymiskar myndugleikar, og fingið fýra ymisk svar. Hon saknaði greiðar reglur og greið svar.

Bæði vístu eisini á, at tað er gjøgnumgangandi í føroysku skipanini, at man fær ikki rættiligt svar. Tá man í Danmark setur fram ein spurning ella ynski, so verður hetta kannað væl og virðiliga, og so fær man eitt greitt aftursvar.

Magni vísti á tvørrandi hjálp og generellar manglar í almannaskipanini í Føroyum. Tað er í alt ov lítlan mun menniskjað, ið er í fokus, og í alt ov stóran mun manglarnir og tørvandi pengar og so framvegis.

Eftir teirra framløgur, fekk fundarfólkið høvið at seta fram útdýpandi spurningar úr salinum.

Fyrilesturin endaði við, at Magni Christiansen sang »Her glaður eg ferðist«.

# Eiga at banna fosturtøku

**Eitt mál, ið eftir mínum tykki er ógvuliga álvarsamt, er fosturtøkuspurningurin. Flestu av okkum, ið eru samlað her í dag, eru nokk samd um, at fosturtøka, umframt at vera skaðilig fyri kvinnuna, er beinleiðis týning av menniskjalívi, segði Tóri Højgaard**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit vita, at fosturtøkur verða framdar í Føroyum, men vit geva okkum kanska ikki altíð far um, hvussu nógvir føroyingar reint faktiskt verða nøktaðir rættin til lívið, segði Tóri Højgaard.

Hann upplýsti, at sambart Hagstovuni, so eru 645 fosturtøkur framdar í Føroyum seinastu 13 árini. Hetta svarar til einar 24 stórar fyrstu flokkar, ella alt fólkið á Skála, á Eiði, í Norðagøtu ella í Hvalba.

Av hesum fosturtøkum var kvinnan í 538, ella 80% av førunum, millum 20 og 49 ár – also ikki ungar, ómyndugar gentir, ið blivu við barn – men vaksnar kvinnur. Eisini er vert at leggja afturat, at ein kanning, sum varð gjørd í USA í 2004, vísti, at bert 1% av fosturtøkunum, ið vóru framdar, vóru vegna neyðtøku, og bert 0,5% vóru vegna insest.

Eisini vísti kanningin ein samanhang millum fíggjarliga støðu og fosturtøku títtleikan: fleiri fátakar enn ríkar kvinnur fingu framt fosturtøku. Sjálvt um tað er óvíst, so er tað ikki óhugsandi, at hesi tøl líkjast tendensinum í Føroyum

Also vísa hagtølini at tær tríggjar høvuðsgrundgevingarnar fyri fosturtøku als ikki halda, tá kemur til stykkið, og at fosturtøka í stóran mun verður nýtt sum hjálp uppá sosialar trupulleikar, segði Tóri Højgaard.

## Banna fosturtøku

Hann segði, at tað er møguligt at hann tekur feil, men tað er hansara fatan, at tey, ið eru ímóti fosturtøku, í nógv ár hava roynt at hildi fast við gomlu fosturtøkulógina, helst tí at tey hava borið ótta fyri, at um nøkur broyting var framd, so hevði tað verið til tað verra heldur enn tað betra.

- Eg haldi at tíðin er komin til, at vit fara aggressivt inn og arbeiða fyri einari nýggjari fosturtøkulóg, einari lóg, ið bannar fosturtøku í øllum førum, uttan tá lækni metir, at lív stendur móti lívið. Vit skulu ikki sita og vóna, at tey, ið eru fyri fosturtøku, ongantíð klára at samla ein meiriluta á tingið fyri at leysgeva fosturtøkuna – nei, vit skulu verða proaktiv! Vit skulu út og upplýsa um, hvat fosturtøka verðuliga inniber og arbeiða fyri, at steðga meiningsleysa slátrinum av okkara dýrasta tilfongi, segði Tóri Højgaard.

Vitandi um, at tað eru kvinnur, ið verðuliga ikki duga at síggja annan útveg enn fosturtøku – tað verið seg vegna sosialar ella fíggjarligar umstøður – so eigur Miðflokkurin framhaldandi at arbeiða fyri, at betra um korini hjá eitt nú støkum uppihaldarum.

- Tað er neyðugt at banna fosturtøku, men fyri verðuliga at koma henni til lívs er neyðugt, at burturbeina tørvin fyri at fáa fosturtøku, segði Tóri Højgaard á landsfundi Miðfloksins leygardagin.